







# Grønland inn í eina nýggja tíð við nýggjum kreftum

**Júst sum Grønland sambært fleiri forsagnum stendur á gáttini til eitt tíðarskeið, har námsvinna og kolvetnisvinna fáa altsamt størri týdning fyri samfelagið og tess búskap, hevur eitt nýtt ættarlið sett seg við stýrið í Nuuk**

GRØNLAND

*Árni Joensen*
*arni@sosialurin.fo*

Tey næstu árini fara IA og tann væl umtókti floksformaðurin Kuupik Kleist at sveiggja taktstavinum í Grønlandi, og harvið endar eitt politiskt tíðarskeið í grønlendsku søguni, har javnaðarflokkurin Siumut uttan slit hevur sitið á ovastu rók, líka síðani grønlendingar fingu heimastýri fyri júst 30 árum síðani. Tað eru ikki júst rósandi orð, sum Siumut-menninir fáa, nú teir noyðast at lata valdið frá sær.

– Teir sokallaðu tungu dreingirnir í Siumut hava ikkii bara stýrt grønlendska landsstýrinum og teirri almennu umsitingini, men teir hava eisini havt avgerandi ávirkan á tær væl kendu almennu fyritøkurnar, sum fyri tað mesta hava havt reyð tøl á niðastu reglu í roknskapinum. Rossahandlar, vinargerðir, ivasamar pengaflytingar og ein penganýtsla, sum mest hevur líkt oyðsli, hava eyðkent tann politiska gerandisdagin, skrivar Ingeniøren, sum er limablaðið hjá danska verkfrøðingafelagnum.

Ingeniøren heldur seg tí hava alla orsøk til at fagna valúrslitinum og at heilsa teimum umleið 52.600 grønlendingunum, sum sambært blaðnum kunnu vænta sær eitt betri lív nú. Hinvegin fer tað politiska skiftið í Nuuk at herða trýstið á ríkisfelagsskapin, tí IA er loysingarflokkur.



*Kuupik Kleist, tann nýggi leiðarin*

Tann 21. juni kemur tann nýggja sjálvstýrislógin í gildi, og hon ber millum annað í sær, at grønlendingar fáa ognarrættin til landsins undirgrund. Harvið fær Grønland eisini rættin til tann partin av tí arktiska landgrunninum, sum danir krevja, og sum Danmark formliga fer at leggja fyri havrættarnevndina hjá ST um fimm ár.

Grønlendski búskapurin hevur verið í ringum sjógvi tey seinnu árini, og vónin um milliardainntøku frá olju, gulli og øðrum evnum gjørdist ístaðin eitt vónbrot. Tí eru tær 3,2 milliardirnar í árligari ríkisveiting úr danska ríkiskassanum framvegis álitið. Men fer undirgrundin at geva grønlendska landskassanum inntøkur í komandi árum, skal danski ríkiskassin hava part av inntøkunum, tó ongantíð meiri enn blokkstuðulin.

## Skuldu atkvøtt um undirgrundina

Ingeniøren heldur tó ikki, at tað verður lætt hjá Grønlandi at spæla einsamalt og at liva av at selja ráevni úr undirgrundini. Blaðið væntar, at russar fara at styrkja seg hernaðarliga í tí arktiska økinum fyri at verja síni tilfeingisáhugamál har, og tí er einki at ivast í, at grønlendingar fáa brúk fyri einum sterkum vini, heldur blaðið. Kanska fer USA at liggja framvið at fáa samband við grønlendingar, tá tað seinasta umsitingarliga sambandið millum Nuuk og Keypmannahavn verður slitið, skrivar Ingeniøren.

Blaðið hjá danska verkfrøðingafelagnum dylur ikki sína hugsan um ta politisku gongdina.

– Tá vit um vikuskiftið atkvøddu um rættin hjá gentum at arva trúnuna, var tað tí, at grundlógin skuldi tillagast. Tað hevði verið betur og hevði samsvarað betur við tíðina, um vit høvdu atkvøtt um rættin til undirgrundina hjá ríkisfelagsskapinum og okkara felags virði, skrivar Ingeniøren at enda í oddagreini.

